## Skúlastjóri heiðraður av Javna



Fyrst í oktober fekk Ásmundur Lamhauge, skúlastjóri fyri Runavíkar skúla, Ársins herðaklapp frá Javna. Tað vóru Guðný Samuelsen og Annette Sørensen úr økisnevnd Javna í Eysturoy, sum saman við Meinhardt Dalbúð, nevndarlimi og Óla Wolles, næstformanni Javna, handaðu honum hesa viðurkenning á arbeiðsplássinum í einum steðgi fríggjamorgunin 5. .oktober. Uppskotið var komið frá foreldrum at børnum við breki í Runavíkar skúla, og hetta uppskot tók ein einmælt nevnd undir við: »Ásmundur Lamhauge, skúlastjóri fyri Runavíkar skúla, fær herðaklappið frá Javna 2007 fyri við ídni at hava virkað fyri, at børn við breki fáa eitt virðiligt skúlatilboð í Runavíkar kommunu. Ásmundur hevur soleiðis verið við til at rúmka skúlan og hevur við dirvi roynt nýggjar leiðir. Saman við dugnaligum starvsfólki hevur hann skipað ein skúla, ið tekur støði í einstaka barninum, og har børnini við breki eftir førimuni eru í dagligum sambandi og samskifti við onnur børn og náttúrligur partur av teirra gerandisdegi – børnunum at gagni, foreldrunum til gleði og skúlanum til heiðurs.«, stendur í grundgevingini fyri at lata skúlastjóranum í Runavík herðaklappið.

# Misálit einasti møguleiki

**Tað metir Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldinum, um málið um Føroyar sum eitt valdømi skal steðgast. Men tað kemur neyvan frá teimum, og Høgni vil síggja grundgevingarnar fyri einum møgligum misáliti, áðrenn hann tekur støðu til tað**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal vil ikki spæla við í tí, sum hann kallar myrkaspæl hjá samgonguni*

- Hetta er alt eitt samgonguspæl. Eitt myrkaspæl, har andstøðan er hildin púrasta uttanfyri. Har sita fýra mans úti í Tinganesi og gera eina avtalu, sum vísir seg kortini ikki at vera ein avtala. Og alt hetta hendir, uttan at teir siga andstøðuni frá.

Tað sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum um støðuna, sum er íkomin eftir, at uppskotið hjá Edmundi Joensen um Føroyar sum eitt valdømi so dyggiliga varð samtykt við aðru viðgerð í Tinginum í gjár.

Hetta er eitt uppskot, sum hevur viðhaldsfólk og mótstøðufólk í øllum flokkum, og soleiðis er eisini í Tjóðveldinum, viðgongur Høgni Hoydal. Sjálvur er hann av teirri meting, at landið er best farið, um tað verður eitt valdømi.

- Tað einasta, sum kann steðga málinum um Føroyar sum eitt valdømi, er eitt misálit á løgmann. Men tað vísir seg, at allir partar, sum vilja steðga málinum, renna undan, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at Jóannes Eidesgaard bara kundi hildið fast við sonevndu semjuna í Tinganesi og hótt við at skriva út nýval, so høvdu tinglimir beinanvegin aftra seg.

- Um samgongulimir veruliga meintu nakað við tað, so kundu teir bara sett fram misálit á løgmann. Tað stendur bæði Marjus Dam og fólkafloksmonnum frítt, men har hevur einki verið at hoyrt í so máta, sigur Høgni Hoydal.

### Einki kompromis

Formaður Tjóðveldisins sigur, at støðan er greið; verður misálit sett fram móti løgmanni, verður borðið ruddað, og hetta uppskot viðgjørt og atkvøtt um. Øll onnur uppskot verða strikað.

- Men tað, sum undrar meg, er, at eingin hevur tikið stig til at finna neyðloysnir ella kompromisir. Vit hava í langa tíð havt djúpt misálit á sitandi samgongu, og kemur eitt misálit nú, er tað eitt internt samgongumál, sum vit ikki fara at blanda okkum í. Vit vilja fyrst síggja grundgevingarnar fyri einum misáliti, áðrenn vit taka støðu til tað, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at eingin hevur nakrantíð vent sær til andstøðuna við hesum málinum.

- Hetta er eitt merkverdugt spæl, har allir partar royna at skáka sær undan ábyrgd, staðfestir formaðurin í Tjóðveldinum.

Hann er als ikki ósamdur við teimum sum siga, at málið í stóran mun er skundað ígjøgnum, og at tað eru mangir leysir endar, sum neyðugt verður at binda saman.

Tað verður neyðugt at fáa avklárað tey tingini, ið ikki enn eru viðgjørd í sambandi við hetta málið, sum í mangar mátar kann kallast kaotiskt. Hetta er eitt samgonguspæl, sum vit ikki vilja hava lut í, men har eru sum nevnt ting, ið greiða má fáast á við triðju viðgerð í morgin, sigur Høgni Hoydal um støðuna í málinum um Føryar sum eitt valdømi.

# Skerjingin væntandi



*Anfinn Olsen og konan, Elisabeth, sum eiga hvør sín triðing í felagnum Framherji*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Stóra skerjingin í svartkjaftaveiðini kom ikki óvart á vinnuna. – Hetta var altíð væntandi, og vit eru hartil samdir í, at neyðugt var at skerja, sigur Anfinn Olsen, reiðari á Høgaberg og Fagraberg**

FISKIRÆTTINDI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjár kundi Fiskimálaráðið boða frá, at semja var gjørd um svartkjaftafiskiskapin fyri komandi ár. Og hetta eru at síggja til rættiliga døpur tøl.

Men Anfinn Olsen, sum er reiðari á Høgaberg og Fagraberg, er ikki so dapurtskygdur kortini.

- Eg var sjálvur við á fyrireikandi fundinum undan samráðingunum, og fyri okkum stóð tað greitt, at ein niðurskurður kom. Og satt at siga eru vit samdir um, at ein niðurskurður er neyðugur, sigur Anfinn Olsen.

Hann greiðir frá, at seinasta hálvtannað árið er fiskurin vorðin størri, og tað kann bara merkja eitt av tveimum. Antin verður ov lítið fiskað av stovninum, so fiskurin fær tíð at vaksa seg stóran, ella er tilgongdin av ungum fiski ov lítil.

Framman undan hevur tilgongdin verið stór, og tí hevur verið væl at fingið. Saman við rímiligum prísi hevur tað hildnast rættiliga væl. Og Anfinn Olsen sigur, at heldur prísurin sær, fer tað nokk at ganga, sjálvt við einum so ógvusligum niðurskurði sum 32%.

– Sjálvandi fer ein slíkur niðurskurður at hava stóra ávirkan hjá svartkjafta- og nótaflotan, men hinvegin so er minking í veiðini helst nakað, sum vit mugu venja okkum við. Og fer minkingin at halda fram, koma vit kanska hartil, at skipini mugu umhugsa at sláa seg saman, sigur Anfinn Olsen, reiðari.

Tað hevur annars ligið í luftini, at ein niðurskurður var á veg, og við samráðingarnar í London fyrr í vikuni komu strandalondini ásamt um, at skerja veiðina við 32% fyri komandi ár. Somuleiðis var semja um, at halda fast við verandi býti fyri komandi ár eisini.

Hetta merkir eina samlaða skerjing í veiðini upp á 550.000 tons, og tað gevur ein niðurskurð til okkum upp á góð 145.000 tons.